# Søkt verður eftir álítandi KVINNU

Smúkkuhjørnið Hotel Bólið søkir eftir álítandi fólki at byrja fulla ella hálva tíð.

**Vit vænta at tú**

- setur kundatænastu høgt
- ert fyrikomandi
- ert ágrýtin og álítandi
- ert klárur at lyfta tak, tá hetta krevst
- klárar alt vanligt telduarbeiði
- hevur kunnleika til føroyskt og enskt

Ætlanin er at viðkomandi skal byrja skjótast gjørligt. Trýggir teir fyrstu mánarnir vera royndartíð.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til felagið á tlf. 213303

**SMÚKKUHJØRNIÐ**
Niels Finsensgøta 51

# Gravarhjálp

*Marknagilsvegur 86 · 100 Tórshavn*
*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*herman@post.olivant.fo*

**Vit útinna allar uppgávur í sambandi við eina jarðarferð frá byrjan til enda**

- Eisini sangir, blómur og kransar
- Vit syrgja fyri sangarum *(í Tórshavn)*
- Vit framleiða okkara egnu kistur *(veita um alt landið)*
- Skipa fyri líkflutningi til og úr Føroyum
- Skipa fyri líkbrenning
- Hjá okkum kanst tú bestemma **tín síðsta vilja**

Sosialurin 341800

# HH-húgvurnar frá '94

**Tann 16. juni** hittast vit øll somul í Hornahúsunum í Havn. Reyp um skúladagar, prát, sangur og hugni verða á skránni, og so er bara at taka góða lagið við.

Tilmeldingar til veitsluna fer fram við at senda teldubræv til klassaball@sosialurin.fo

**Kostnaður 400 kr.**








Nordisk Vegteknisk Forbund

## Til allar kommunur í Føroyum, og áhugaði fyri vetrartænastu á almennum vegum

### NVF-41 – fundur á Hotel Føroyum 7. juni 2007

NVF-41 – Nordisk Vegteknisk Forbund, sum er ein felagskapur við limum úr Finlandi, Svøríki, Noreg, Danmark, Íslandi og Føroyum – hevur, í skeiðinum 2004 – 2008, millum onnur evnir viðgjørt temaið »Vintertjeneste«.

Tann 7. juni verður fundur á Hotel Føroyum um hettar evnið, og verða hervið áhugaði boðin við til hesar fyrilestrar.

**Skráin verður hendan:**

| | |
|---|---|
| 0800–0810 | Velkommen (HP) |
| 0810- 0830 | Oyvindur Brimnes direktør for Landsverk |
| 0830–0845 | Vintertjeneste på Færøerne i dag Dánjal Syderbø |
| 0845 -0900 | Historisk tilbageblik Heini Eysturoy |
| 0900–0930 | Praktisk forhold omkring sne-rydning og glatførebekæmpelse på fortove, stier pladser m.v. i byer, med fokus på tilgænge-lighed. Kim Sørensen, Københavns Kommune, DK |
| 0930–1000 | Sneplove, Øystein Larsen |
| 1000–1015 | Pause |
| 1015-1045 | Saltlage, Jens Kristian Fonnesbech |
| 1045–1115 | GPS styret spredning og data-opsamling, Jesper Dam Buch |
| 1115–1145 | Glatførevarsling, Freddy Knudsen |
| 1145–1245 | Lunsj |
| 1245–1305 | Sukker i salt, Ulf Book |
| 1305- 1325 | Brugerundersøgelse vintertjeneste, Lars Bonfils |
| 1325–1345 | Ruteoptimering, Connie Graul |
| 1345–1400 | Pause |
| 1400–1430 | Vintertjeneste nyt fra Danmark bl.a. vinterseminar, Jens Kristian Fonnesbech m. fl. |
| 1430–1515 | Vintertjeneste nyt fra Island, Finland, Norge, Sverige og Danmark |

Áhugaði kunnu siga frá til Dánjal Syderbø Telefon nr. 34 08 00, danjal@lv.fo

Luttøkugjald á kr. 750,- verður at rinda á konto nr. 9181-161.555. Eik Bank pf., Yviri við Strond 2, FO-100 Tórshavn, www.eik.fo

**Vegna NVF-41 Føroyar**
Dánjal Syderbø - Landsverk
Hanus Poulsen – Klaksvíkar Kommuna

veitst tú ikki tað?
Sosialurin



TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN



# søkir eftir lærarum

Okkum tørvar 4 lærarar í august 2007. Talan er um føst størv á:

- Maskindeildini
- Bildeildini
- Eldeildini
- Trædeildini

**Vit vænta, at tú hevur:**

- sveinabræv innan økið
- evni og hegni at arbeiða við ungdómi
- viðkomandi starvsroyndir
- hollan og dagførdan kunnleika innan økið

Fyrimunur er, um tú hevur víðari útbúgving, teldukunnleika og førleika at undirvísa í alm. lærugreinum.

**Vit bjóða:**

- eitt spennandi og avbjóðandi starv, saman við royndum starvsfeløgum
- møguleika fyri dagføring og eftirútbúgving innan økið
- løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

**Tú:**
skal senda umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndum innan 7. juni 2007 til:

Tekniska Skúlan í Tórshavn, Postrúm 3239, 110 Tórshavn

Um tú vilt vita meira um starvið, kanst tú ringja á tlf. 308050 og spyrja eftir:

- **Helga Mortensen**, deildarleiðara á maskindeildini
- **Eirik Ó. Simonsen**, deildarleiðara á bildeildini
- **Jógvan Sørin Hansen**, deildarleiðara á eldeildini
- **Atla Poulsen**, deildarleiðara á trædeildini,

Størvini, sum umfata undirvísing av maskin-smiðum, bilsmiðum, el-lærlingum, timbur- og snikkaralærlingum, skulu setast 9. august 2007. Fyrstu 2 árini eru royndartíð, har tú, sum settur/sett verður í starv, má vera til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg námsfrøðiliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur/sett í fast starv.

**Maskindeildin** tekur sær av undirvísing av maskinsmiðum og SIT-næmingum. Á deildini starvast 6 lærarar og ein verkvørður

**Bildeildin** tekur sær av undirvísing av bilsmiðum og SIT-næmingum. Á deildini starvast 4 lærarar og ein verk-vørður.

**Eldeildin** tekur sær av undirvísing av el-lærlingum og SIT-næmingum. Á deildini starvast 5 lærarar og ein verk-vørður.

**Trædeildin** tekur sær av undirvísing av timbur- og snikkaralærlingum og SIT-næmingum. Á deildini starvast 7 lærarar og ein verkvørður.

Eisini undirvísa lærararnir á eftirútbúgvingarskeiðum og teimum víðari útbúgvingum, sum skúlin hevur.